ítróttur

Nr. 103 • fríggjadagur • 3. juni 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Gunnar sleit hælsinuna

**Eftir at Gunnar á Steig undir venjing mikukvøldið sleit hælsinuna, eru teir í EB/Streymi farnir at leita eftir nýggjum málverja**

EB/STREYMUR
*Jóannes Hansen*



Málverjin hjá EB/Streymi, Gunnar á Steig, sleit mikukvøldið hælsinuna undir venjing á Mølini á Eiði. Hann endaði á Landssjúkrahúsinum, har hann varð skurðviðgjørdur. Tað fara at ganga nógvar vikur, áðrenn tað verður hugsningur hjá honum um aftur at venja og spæla fótbólt. Tí eru teir í EB/Streymi farnir at leita eftir nýggjum málverja.

- Hetta var ógvuliga óheppið. Serliga hjá Gunnari, sum hevur staðið seg ógvulig væl seinastu vikurnar. Tað var ikki minst hansara avrik, sum var orsøkin til, at vit vunnu øll stigini í Fuglafirði, og ímóti KÍ helt hann teimum heilt burturi frá at gera mál, sigur Magnus á Stongum, sum er hjálparvenjari hjá EB/Streymi og kommunulækni á Eiði.

*Hvussu verður nú hjá tykkum?*

- Vit eru farnir at kanna møguleikarnar fyri at finna nýggjan málverja. Hetta er jú spildurnýtt fyri okkum. Málverjusessurin er týdningarmikil, og hesa ársins tíðina eru málverjarnir jú bundnir í feløgum, staðfestir Magnus á Stongum.

### Tilburðurin

Í hesi vikuni hava teir í fleiri feløgum tikið sær eitt sindur av løttum. Eingin landskappingardystur verður í vikuskiftinum, og tá ið tað annars fer at verða spælt mest sum út í eitt inntil síðst í oktober, hava fleiri venjarar avlýst fleiri venjingar í hesi vikuni. Tað verður gjørt, tí spælararnir, sum hava vant støðugt síðani stutt eftir ársskiftið, treingja til at hvíla seg.

Ein av fáu venjingunum hjá EBStreymi í hesi vikuni var mikukvøldið. Seks venjarar, sum eru í holtur við Slóðara útbúgvingina hjá Fótbóltssambandinum, vóru á Mølini og vandu og fylgdu venjingini. Tá ið venjingin var um at vera liðug, leyp Gunnar upp eftir bóltinum, sum var lagdur innfyri. Hann datt niður og var liggjandi.

Magnus á Stongum er ein av teimum, sum er í holtur við Slóðara útbúgvingina. Hann greiðir soleiðis frá:

- Eg sá, at Gunnar datt, og eg helt, at hann hevði beklað. Gunnar helt, at onkur hevði sparkað hann í beinið. Tað hevði eg sæð, at eingin hevði gjørt. Soleiðis kennist tað, tá ið hælsinan slitnar, og tá ið vit høvdu fingið hann undir tak, og eg hevði hugt upp á tað, var eingin ivi um, at hælsinan var slitnað. Gunnar fór á Landssjúkrahúsið við sjúkrabili. Fyrst og fremst snýr tað seg um, at hann vinnur førleikan aftur. Men sjálvandi kom hetta eisini ógvuliga illa við hjá okkum.

Gunnar á Steig hevur verið á Eiði síðani í 2001. Tá ið EB/Streymur í fyrsta umfarinum í landskappingini 28. mars vann trý stig í Gøtu, vardi Gunnar EB/-Streyma málið fyri 100. ferð. Nú fara tað at ganga nógvar vikur, áðrenn klaksvíkingurin, sum í níti árunum og fram til og við 1998 var málverji hjá KÍ, aftur verður førur fyri at spæla fótbólt.

# Mega-troyggja til 12. mann

**Nýggjasta átakið hjá føroyska 12. manninum er ein risa landsliðstroyggja, sum skal vísast fram, tá altjóða dystir eru á skránni**

12. MAÐUR
*Jákup Mørk*

Tá viðhaldsfólkini hjá Milan, Barcelona og øðrum stórfeløgum kunnu hava risa bannarar við felagslitunum á, hví skulu føroyskir fótbóltsáskoðarar so ikki kunna hava nakað líknandi?

Hetta tykist vera hugburðurin, nú føroyski 12. maðurin hevur fingið eina rimmar landsliðstroyggju, sum skal nýtast, tá landsliðið spælir fótbóltsdyst.

Tað er annar av høvuðsstuðlunum hjá fótbóltslandsliðnum Føroya Banki, sum hevur latið blusuna til 12. mann.

Ætlanin er, at 12. Maður skal hava blusuna við til dystirnar í framtíðini. Fyrstu ferð verður á Svangaskarði nú leygardagin, og eisini verður hon brúkt, tá stórdysturin móti Írlandi verður á skránni komandi mikudag.

Enn hevur áskoðarafelagið ikki gjørt av júst hvussu hon skal nýtast, men tað eru nógvir møguleikar. Hon er sera stór, og tekur nógv pláss um hon skal hanga uppi ella liggja.




*Á myndini síggjast landsliðsspælararnir Jákup Mikkelsen og Jákup á Borg. Frammanfyri síggjast umboð fyri Føroya Banka og 12. mann, John Eystberg og Tommy Falkenberg*

## Startrøðin á norðoyastevnu

**Róðrarsambandið hevur nú boðað frá, í hvørjari nummarrøð bátarnir skulu liggja til fyrsta FM-róðurin**

Røðin í einstøku bátaflokkunum er henda:

**5-mannafør dreingir:**
1 Drekin
2 Fípan Fagra
3 Sílið
4 Tekla
5 Falkur
6 Tjaldrið
7 Ritan
8 Blikur
9 Dúgvan

**6-mannafør kvinnur:**
1 Riddarin
2 Sølmundur
3 Gongurólvur
4 Jarnbardur
5 Páll Fangi
6 Lómur

**5-mannafør gentur:**
1 Blikur
2 Tekla
3 Drekin
4 Erla Kongsdóttir
5 Tjaldrið

**5-mannafør kvinnur:**
1 Fípan Fagra
2 Ritan
3 Sílið
4 Blikur
5 Firvaldur
6 Royndin Fríða
7 Junkarin
8 Drekin
9 Falkur
10 Ørnin
11 Frúgvin

**6-mannafør menn:**
1 Sølmundur
2 Lómur
3 Hósvíkingur
4 Strálan
5 Páll Fangi
6 Gongurólvur
7 Fuglfirðingur
8 Víkingur
9 Sundabáturin
10 Kollfirðingur
11 Stjørnan
12 Jarnbardur

**8-mannafør:**
1 Nevið Reyða
2 Árnfirðingur
3 Knørrur
4 Ørvur
5 Argjabáturin
6 Miðvingur
7 Kvívíkingur

**10-mannafør:**
1 Eysturoyingur
2 Havnarbáturin
3 Hoyvíkingur
4 Nólsoyingur
5 Vágbingur
6 Skálabáturin